Tryggingarfelagið Føroyar stuðlar bæði Heidi og ÍSB

Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjørt stuðulssáttmálar við bæði Heidi Andreasen og ÍSB, og eru sáttmálarnir báðir galdandi til árslok næsta ár. Hetta kemur væl við hjá Heidi, sum í næstum fer á paralympisku leikirnar í Athen, og ÍSB, sum støðugt økir um sítt virksemi og síni tilboð til brekað

STUÐULSAVTALA
tíðindaskriv

Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjørt stuðulssáttmála við bæði Heidi Andreasen og Ítróttasambandið fyri brekað. Frá vinstru: Heðin Mortensen og Brynhild Setberg frá Tryggingarfelagnum Føroyar, Heidi Andreasen, ÍSB-svimjari og Egga Jensen, formaður í ÍSB

Frá 17. til 28. september fara vit enn eina ferð at fylgja við, hvussu gongst Føroyum í paralympisku leikunum. Leikirnir, sum verða í Athen, eru teir sættu við føroyskari luttøku, og hetta verður aðru ferð, at svimjarin Heidi Andreasen er við til paralympiskar leikir.

– Eg eri sera spent til hesar leikirnar, men hevði ikki kunnað gjøgnumført tað, uttan at fingið stuðul frá onkrum. Tað hevur ótrúliga stóran týdning fyri meg, at onkur stendur aftanfyri, tí tað krevur nógv at vera við í so stórum kappingum, sigur Heidi Andreasen.

Síðsta árið hevur eiðisgentan búð í Havn og vant dagliga við Havnar Svimjifelag. Hon fer í hylin hvønn einasta dag, og vanliga er talan um venjing í tveir til tríggjar tímar, so svimjingin fer við rættiliga nógvari tíð.

– Tað er ikki annað at gera, enn at hanga í og gera sítt besta, tí eg svimji so sjáldan saman við teimum, eg skal kappast ímóti, at eg má finna tíðirnar hjá teimum fram á internetinum, um eg skal finna útav, hvussu væl tað gongst hjá mær sjálvari, sigur Heidi.

»Kappast« á internetinum

Hóast tað altso bara umvegis internetið ber til dagliga at »kappast« við onnur, er líkt til, at hon dugir væl at fáa burturúr. Bara tað, at hon hetta síðsta árið hevur sett tvey heimsmet, gevur greiðar ábendingar og seriøst arbeiði saman við venjaranum, Remi Lamhauge.

– Heidi hevur vant miðvíst síðani í januar fram ímóti paralympisku leikunum, og eisini hava vit verið til tvær kappingar uttanlands, fyrst í Danmark í februar og síðani í Sheffield í mai, greiðir venjarin frá.

– Í Danmark fekk Heidi vant saman við norska landsliðnum og pørtum av tí danska, og tá vóru tvær venjingar um dagin, sum góvu nógv. Nú vit skulu til Athen, fara vit eina góða viku frammanundan úr Føroyum til Danmarkar, so síðsta hondin kann leggjast á fyrireikingarnar, áðrenn farið verður til Grikkalands fáa dagar undan leikunum.

ÍSB nógv virksemi

Umframt at Heidi Andreasen og Tryggingarfelagið Føroyar hava skrivað undir ein stuðulssáttmála, er eisini sáttmáli gjørdur millum Ítróttasambandið fyri brekað og Tryggingarfelagið Føroyar.

– Við tí nógva virksemi, vit hava, hevði tað verið sera tungt - fyri ikki at siga ógjørligt - hjá ÍSB at havt gongd í øllum. Tí eru vit sera glað fyri stuðulin, ið hevur ómetaliga nógv at siga fyri okkum, sigur Egga Jensen, formaður í ÍSB.

– Somuleiðis fegnast vit um, at tryggingin velur at stuðla Heidi Andreasen, nú hon aftur stendur framman fyri einari stórari avbjóðing, sum í nógvar mátar er rættiliga krevjandi.

Størstu ítróttagreinirnar, sum kunnu íðkast innan ÍSB, eru svimjing og boccia, men eisini er eitt sindur av borðtennis, frælsum ítrótti og bogaskjóting, umframt at ÍSB er farið undir fimleik á motiónsstigi og stavbólt.

Egga Jensen sigur, at ÍSB eisini hevur tikið upp samstarv við fleiri skúlar, og millum annað verður nú leygardagin skipað fyri einum stórum barnadegi í badmintonhøllini í Gundadali. – Hjá okkum er tað soleiðis, at vit noyðast at gera eitt uppsøkjandi arbeiði fyri at finna nýggjar íðkarar, so tí er umráðandi hjá okkum at hava gott samstarv nógvar vegir, sigur hann.

Glað fyri at stuðla

Eisini Tryggingarfelagið Føroyar fegnast um, at tað er gjørligt at stuðla bæði Heidi Andreasen og ÍSB.

- Okkara vón er, at stuðulin veruliga kann koma bæði Heidi og ÍSB til góðar, ikki minst tá stór tøk skulu takast, sum eitt nú at Heidi fer til paralympisku leikirnar, sigur Heðin Mortensen frá marknaðardeildini á Tryggingarfelagnum Føroyar.

Eisini Brynhild Setberg, deildarleiðari á Tryggingarfelagnum Føroyar, fegnast um, at felagið kann veita bæði Heidi og ÍSB eina hjálpandi hond:

– Vit eru sera glað fyri, at vit hava fingið møguleikan at stuðla í hesum førinum, og ikki minst fegnast vit um, at vit kunnu gera umstøðurnar hjá Heidi Andreasen lættari, sigur hon.

– Allir føroyingar eru góðir við Heidi, sum samstundis má sigast í allar mátar at vera eitt gott fyridømi fyri føroysk ungfólk. At vit so eisini kunnu vera við til at hjálpa henni fram á leið, eru vit sera fegin um.

Barnadagurin hjá ÍSB

ÍTRÓTTUR
Tíðindaskriv

Leygardagin 4. september fer Ítróttasambandið fyri Brekað at skipa fyri einum barnadegi. Dagurin verður hildin í HBF-høllini í Gundadali.

Hesin dagur skal bera dám av ítrótti sum ítriv, ið øll kunnu vera við í. Øll børn og ung, sum hava okkurt brek, eru vælkomin saman við foreldrunum. Her verður høvi at royna seg í ymiskum ítrótti og spølum. Eisini verður høvi hjá bæði børnum og foreldrum at hoyra meiri um, hvørji tilboð ÍSB hevur til børn og ung.

ÍSB vónar, at nógv fara at taka undir við hesum tiltaki, og at øll fara at fáa ein góðan, virknan og hugnaligan dag saman. Barnadagurin byrjar kl.10.30 og endar kl.13.30.

Jón Rói var ikki við

Føroyski miðverjin fór fyrrapartin í gjár saman við hinum útisetunum á landsliðnum til Sveis og kundi tísil ikki spæla í donsku steypakappingini í gjárkvøldið

ÚTISETI
Jóannes Hansen

Í gjárkvøldið skuldi felagið hjá Jón Róa Jacobsen, Frem, spæla í donsku steypakappingini. Teir skuldu spæla á útivølli ímóti Brønshøj, sum eigur heimavøll á Tingbjerg stadion. Frem venjarin, Ebbe Skovdahl, gramdi seg undan stuttu ferðini úr Valby og til Tingbjerg um, at saknur fór at vera í Jón Róa Jacobsen, sum var upptikin av landsliðsørindum.

Dysturin í Brønshøj var tann einasti í donsku steypakappingini í gjárkvøldið. Næsti dysturin í triðja umfarinum verður týskvøldið. Tá skal Fremad Amager spæla á útivølli ímóti Gladsaxe Hero. Teir tríggir føroyingarnir í Fremad Amager fara ikki at vera við í tí dystinum. Tá fara teir at vera upptiknir av fyrireikingunum til stóru avbjóðingina á heimavølli næsta mikukvøld ímóti Fraklandi.

Tíðliga fyrrapartin í gjár fóru Jón Rói Jacobsen og hinir útisetarnir í Danmark, sum hava fingið landsliðsboð, úr Keypmannahavn og til Sveis. Ferðalagið úr Føroyum skuldi fara avstað seint seinnapartin í gjár. Dysturin í Sveis verður spældur kl. 1630 føroyska tíð leygardagin.

Bilar til sølu

Opel Astra 1.6 bensin

· Árg. 2001 · Km. 40.000
· Rustviðjørdur · Originalt anlegg við fløguspælara · Originalar 15” sportfelgur · Krók · Vælhildin.
prísur **99.500,-**

Nissan Almera 1,5 bensin

· Km. 23.000 · El-rútar framman
· El-spegl · hita í setrum
· Anlegg við fløguspælara
prísur **135.000,-**

Fiat Stilo 1,8i bensin

· Árg. Juni 2002 · Km. 51.000
· El-rútar framman · Aircondition
· Tripteldu · ASR (antispin)
· Originalt radio við fløguspælara
· 2 hurðar · Forkromaðar sportfelgur 17'' við góðum dekkum
· Góð píkadekk á felgum · Vælhildin
prísur **160.000,-**

Opel Vectra 1.6 bensin st. car persónbilur

· Árg. aug. 2001 · Km. 46.045
· Aircondition · Radio · Bagaguskjúlara · Takboylar · Vælhildin.
prísur **158.500,-**

Kia Clarus 2,0 bensin

· Árg. juli 1997 · Km 125.000
· El-rútar framman · Fjarstýrt centrallás · Pioneeer anlegg
· Sportfelgur við góðum summardekkum, góð píkadekk fylgja við
· Vælhildin.
prísur **85.500,-**

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tel 31 10 13 · Fartel 51 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com



Do^spqbfk^o
KĠdboÜ l d
r j s Í ifkd^o
BASALT
G@Ps^_lÜpdÐq^ 3-
qbi /..33.* /..33/*0/.330
_^p^iq=mlpq lifs^kqcl

i Sosialurin

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?

Til sølu
Mitsubishi Pajero 3,0 V6

Bilurin er í sera góðum standi, bert ein eigara.
Einans koyrt 56.000 km. · Autm. gear, ein fragd at koyra.
Nógv eykaútgerð, so sum: Aircon., el.rútar, hiti í setrum, tokulyktir og eyka langljós, spoylarar og gáttir o.a.
Kann skifta til trekk uppá øll 4 hjólini meðan hann koyrir.

Lagalig fígging, t.d. kann útgjaldið vera einans kr. 42.000,-
So práta vit um restina.

Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging

DANSISKEIÐ

Foreldrabólkurin "Kom og dansa fyri ung" saman við instruktørum úr "Komið og Dansið" í Íslandi skipar fyri dansiskeiðum og almennum dansi fyri ung og vaksin.

Leygardagin 4. september og sunnudagin 5. september kl. 16.30 - 18.30 verður grundskeið í Rock'n roll, Swing og Blues Boogie fyri ung 13 - 18 ár í Margarinfabrikkini, Virkishús fyri børn og ung, M. Heinasonargøta 12, Tórshavn.

KOSTNAÐUR: 40,-
Hava tit +Konto í Føroya Sparikassa er kostnaðurin kr. **25,-**

Eisini verður grundskeið fyri vaksin í Rock'n roll, Swing og Blues Boogie í Losjuni Tinghúsvegi 18 leygardagin 4. september og sunnudagin 5. september kl. 13.30 - 16.00. Vaksin, einstaklingar ella pør eru vælkomin.

Kostnaður fyri skeiðið er 80 krónur fyri hvønn.

ALMENNUR DANSUR

Royk- og rúsfríur dansur verður leygarkvøldið 4. september í Losjuni frá kl. 21 - 24 fyri ung og vaksin. Kostnaður kr. 80,-

Komið og roynið Rock'n roll, Swing og Blues Boogie!!!

Tilmelding til dansiskeiðini í Kunningarstovuni, tel 31 57 88

Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

TILBOÐ
GALDANDI TIL 11. SEPTEMBER



GOSBAÐ
• Mát: 135 x 135cm, 294 ltr
• Við 8 jetdysum
BERT **8.598,-**
spar 2.400,-

SPEGLGLAS-SKJÓTIHURÐAR
• Breidd 120 cm. samlað
• Hædd 226 cm.
NÚ **1.198,-**
spar 800,-



Laminatgólv
• Easy snap system
• Ahorn ella bók
BERT **68,- pr. m²**

BEKO 20 T58
• 20" sjónvarp
• v/tekstvarpi og fjarstýring
BERT **1.998,-**

INDESIT G74 turkitrumla
• Tekur 5 kg
• Mekanisk stýring
BERT **1.998,-**
spar 700,-

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001

Sosialurin
-tað loysir seg